# Stór kapping um miðvøllin

**Hjá EB/Streymi eru báðir sentralu miðvallararnir burturi, meðan tveir av lyklaspælarunum á B36 miðvøllinum eru tøkir aftur**

B36-EB/STREYMUR
*Jóannes Hansen*

B36 er oddalið, og í morgin skulu teir syrgja fyri ikki at kiksa á heimavølli ímóti EB/Streymi, sum fyri tveimum árum síðani oyðilegði FM møguleikan hjá B36. Ta ferðina endaði B36 fýra stig aftanfyri meistararnar úr HB, og tað árið misti B36 seks stig ímóti EB/Streymi!

Í triðja umfarinum í ár vann B36 1-0 í Gundadali ímóti EB/Streymi. Mánakvøldið vóru teir í B36 tryggir í Fuglafirði, og hvat manning viðvíkur, eru teir uppaftur betri fyri hesa ferð. Mikkjal Thomassen og Ingi Højsted, sum fyri tað mesta hava verið sentralir miðvallarar, eru tøkir aftur eftir leikbann. Tað gevur venjaranum, Sigfríða Clementsen, positivan trupulleika. Niels Joensen varð innskiftur mánakvøldið, og tað vil siga, at B36 hevur í minsta lagi sjey og kanska fleiri kvalifiseraðar til miðvallarplássini.

Hjá EB/Streymi hava teir ikki so nógv fólk at taka av. Tí rakar tað serliga meint, at báðir teir sentralu miðvallararnir nógvu tær seinastu ferðirnar, Knút Vesturtún og Marni Djurhuus, ikki eru tøkir hesa ferð. Liðformaðurin, Knút Vesturtún, sum hevur verið sera drúgvur, er leikbannaður, og Marni Djurhuus, sum altíð arbeiðir nógv, fekk ein løst í fótin undir venjing týskvøldið.

René Tórgarð hevur vant nógv við EB/Streymi seinastu vikurnar, og fyrsta ferðin, at hann hevur loyvi at verja málið í landskappingardysti, verður ímóti barndómsfelagnum, B36.

# GÍ skal siga takk fyri seinast

**Bæði á Tvøroyri og í Gøtu snýr tað seg um at fáa úrtøku, sum kann vera við til at lyfta liðnum burtur úr botninum**

GÍ-TB
*Jóannes Hansen*

Tvørámenn fara enn eina ferð í Eysturoynna at royna eftir stigum. Higartil í ár hava teir verið í Eysturoy fýra ferðir, og hóast avrikini hava verið á einari leið, so hevur tað bara eydnast at fáa eitt stig - ímóti NSÍ.

TB vann 3-0 á GÍ á heimavølli í 9. umfarinum, og tað vilja gøtumenn ikki hava sitandi á sær. Í Gøtu hevur fótbóltsprátið í hesi vikuni eitt nú snúð seg um, at tað var harmuligt, at teir misnýttu brotsspark í síðstu løtu í Runavík og harvið søplaðu tvey stig burtur.

- Men tað kunnu vit ikki brúka til nakað nú. Vit skulu eisini minnast til, at okkara málverji bjargaði brotssparki hjá NSÍ, sum væl kundi havt vunnið, um teir høvdu skorað úr ellivu metrum, heldur Pauli Jarnskor, hjálparvenjarin hjá GÍ. Hann ásannar, at tað verður strevið ímóti væl skipaða TB, og at tað er neyðugt við fullari úrtøku fyri at sleppa leysur av botninum.

Súni Olsen var leikbannaður í Runavík. Nú er fasti brotssparksskjúttin tøkur aftur. Símun Louis Jacobsen hevur ikki vant í vikuni orsaka av snuddi. Í gjár var ikki greitt, um hann verður førur fyri at spæla í morgin.

TB skal halda til á Svangaskarði í nátt. Ofta hevur kortrúgvan verið stór hjá teimum, sum stríðast fyri at sleppa undan niðurflyting. Tað vita teir alt um á Tvøroyri, men í ár hava teir fingið ógvuliga fá kort, og allir teir, sum hava spælt seinastu ferðirnar, vera í kvøld við á ferðini norður um fjørðin.

# HB hevur knívin á barkanum

**VB hevur fingið luft undir veingirnar seinastu ferðirnar, og teir hava fyrr í ár vunnið á heimavølli ímóti meistarunum**

VB-HB
*Jóannes Hansen*

Vágbingar vunnu 10. apríl í 3. umfarinum 1-0 á HB á Vágseiði. Síðani gekk leingi illa hjá VB, sum eftir fyrstu ellivu umførini hevði skorað seks mál. Nú hava teir í trimum umførum skorað níggju mál.

Allir vágbingarnir eru tøkir, og Dan Djurhuus, sum fyrstu ferð spældi við VB í 1996, fer sambært VB heimasíðuni í morgin at umboða felagið fyri 100. ferð í morgin. Hann hevur í seinastu fimm dystunum skorað fýra mál.

Í HB eru allir spælararnir tøkir uttan Jákup á Borg, sum er leikbannaður. Báðir venjararnir hava verið burturi í hesi vikuni. Heine Fernandez er á venjaraskeiði í Danmark, og hann verður ikki við í Vági. Hjálparvenjarin, Albert Ellefsen, hevur verið í Litava og hugt eftir Kaunas, sum HB skal spæla ímóti í Europa Cup á heimavølli 13. juli.

- Nú mugu vit í fyrstu atløgu gloyma altjóða luttøkuna og hava fokus á avbjóðingini í Vági. Vit taptu trý stig í mun til B36 í trettanda umfarinum, og eg rokni ikki við, at B36 fer at missa stig í vikuskiftinum. So vit hava knívin á barkanum undan ferðini til Vágs. Men vit hava gott mót, sigur HB liðformaðurin Rúni Nolsøe.

Tað er ikki á hvørjum ári, at HB tapir tveir landskappingardystir á rað. Síðst teir vóru úti fyri tí var í 2001. Tá taptu teir í 12. umfarinum 3-2 í Gøtu, og so taptu teir 19. august í 13. umfarinum 2-0 - í Vági!

# Greið tala

| | 05 | 04 | 03 | 02 | 01 | 00 | 99 | 98 | 97 | 96 | 95 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| ÍF-KÍ | 0-3 | 1-6 | - | - | - | - | 0-1 | 0-0 | 1-9 | 1-2 | - | 0-1-5 | 3-21 |
| VB-HB | 1-0 | 0-2 | 2-3 | 0-0 | 2-0 | 0-0 | 1-0 | 1-1 | 1-1 | 1-0 | 1-1 | 4-5-2 | 10-8 |
| Skála-NSÍ | - | 1-2 | 1-3 | 0-4 | - | - | - | - | - | - | - | 0-0-3 | 2-9 |
| GÍ-TB | - | - | - | 2-0 | - | - | - | 3-0 | - | 3-1 | 2-0 | 4-0-0 | 10-1 |
| B36-EB/S | 1-0 | 2-4 | 4-2 | 2-1 | 1-0 | - | - | - | - | - | - | 4-0-1 | 10-7 |

Hagtølini hesa ferð peika á nakrar óvanliga greiðar favorittar til dystirnar um vikuskiftið. Soleiðis tykist nærum eingin ivi vera um, at ávíkavist KÍ, NSÍ, TB og B36 skulu fáa fult um vikuskiftið, meðan tað hinvegin stendur sera javnt millum VB og HB, tá dystast verður á Eiðinum.

Hagtøl eina flyta tó eingi stig í ársins útgávu av fótbóltslandskappingini, og tí verður sjálvandi spennandi at síggja útfallið, nú hagtølini skulu standa sína roynd.

Hvussu er og ikki, so vísir talvan, hvussu tað hevur hilnast, tá mótstøðuliðinin sunnudagin hava dystast í tilsvarandi dystunum seinastu 10 árini.

**-jm**

# Hagtølini skulu gerast til einkis

**Skálamenn fara at gera enn eina roynd at sleppa av við keðiligu hagtølini, sum siga, at teir ongantíð hava fingið stig ímóti NSÍ**

SKÁLA-NSÍ
*Jóannes Hansen*

Tað er óreingiligt. Hóast tað hevur gingið sum eftir ánni hjá skálamonnum í fjør og í ár, so hava teir higartil ongantíð fingið stig ímóti grannunum hinumegin fjørðin.

- Eg veit ikki, hví tað er soleiðis. Vit vilja vinna á teimum, og tað fara vit eisini at gera alt okkara fyri at gera sunnudagin. Men higartil hava teir havt takið á okkum, staðfestir Bogi Gregersen. Løsturin í lærinum, sum noyddi hann út, tá ið teir spældu ímóti B36, vitjaði aftur í Finnlandi. Í gjárkvøldið skuldi Bogi royna at venja fyri fyrstu ferð í hesi vikuni.

Fleiri skálaspælarar hava vitjað hjá fysioterapeutinum í vikuni, men tað verður vónað, at teir allir vera tøkir í morgin.

Tá ið Skála vann ímóti HB í Havnini var Iulian Florescu leikbannaður. Hann verður við aftur í morgin.

- Skála er ivaleyst tað liðið sum í løtuni vísir besta fótbótlsspælið. Tað verður torført hjá okkum, men vit hava gott mót, og hugburðurin er góður undan stóru avbjóðingini, sigur NSÍ venjarin, Trygvi Mortensen.

Ungu spælararnir í NSÍ hava staðið seg væl seinastu ferðirnar, so kappingin um plássini er stór. Veteranarnir Sjúrður Jacobsen og Gert Langgaard eru framvegis skaddir. Kári Hansen hevur royndt at venja aftur, og allir hinir eru tøkir.

Tá ið liðini hittust í Runavík vann NSÍ 1-0.

## formuladeildin

| | dystir | v - j - t | vu. mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B36 | 14 | 8 - 5 - 1 | 20 | 6 | 14 | 29 |
| 2 HB | 14 | 9 - 1 - 4 | 35 | 16 | 19 | 28 |
| 3 Skála | 14 | 7 - 5 - 2 | 29 | 16 | 13 | 26 |
| 4 NSÍ | 14 | 5 - 6 - 3 | 21 | 17 | 4 | 21 |
| 5 EB/Streymur | 14 | 4 - 6 - 4 | 15 | 22 | -7 | 18 |
| 6 KÍ | 14 | 4 - 2 - 8 | 21 | 26 | -5 | 14 |
| 7 GÍ | 14 | 4 - 2 - 8 | 18 | 24 | -6 | 14 |
| 8 TB | 14 | 3 - 5 - 6 | 13 | 21 | -8 | 14 |
| 9 VB | 14 | 4 - 2 - 8 | 15 | 24 | -9 | 14 |
| 10 ÍF | 14 | 3 - 4 - 7 | 16 | 31 | -15 | 13 |

## Dystir um vikuskiftið

**Formula-deildin**

| | | |
|---|---|---|
| 02.07 | ÍF-KÍ | Georg Rasmussen |
| 03.07 | VB-HB | Dagfinn Olsen |
| 03.07 | Skála-NSÍ | Birgir Sondum |
| 03.07 | GÍ-TB | Petur Reinert |
| 03.07 | B36-EB/S | Suni Johansen |

**Steypakappingin, kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 02.07 | KÍ-B36 | Ransin Djurhuus |